# nnið meg í hóttanum



*Ingeborg Vinther hevur nú staðið á oddda fyri landsins størstu fakfelagsrørslu í heili 25 ár. men hon er ikki útbrend enn og battaríið løðir hon uttandura og í f'øroyskum dansi*
*Myndina tók Bárður Lydersen*

fíggjarligt bakkast. Tað vóru eisini nógv feløg, sum høvdu sett pening í virkini í fyri at skapa arbeiðspláss á teimum ymsu plássunum. Men kortini løgdu tey hesi virkini lamin fyri felags sakir.

Hesi seinastu verkføllini hava eisini verið hørð, men tað í 1987 var helst tað ringasta tí tá var verkafólkið verri tryggjað enn tað er nú við verkfalsgrunnum.

### Vórðu seinkað í fleiri ár

Hinvegin sleppur ein fakfelagsleiðari, sum hevur so leingi, heldur ikki undan málum, sum pína.

– Eitt av teimum málum, sum harmar meg mest, tað er, at landsstýrið ikki gav okkum frið til at seta tað eftirlønarskipan í verk, sum vit nú hava arbeitt við í fleiri ár.

– Tað byrjaði longu, tá ið Samhaldsfasti kom. Vit tóku fult undir við Samhaldsfasta, tí hetta var ein skipan, sum ikki gjørdi mun á fólki. Men tíverri varð hann bara eitt neyðaregg og kom ikki at virka eftir ætlan. Tí sóu vit okkum ongan møguleika, enn at fara undir okkara egnu eftirlønarskipan.

IngeborgVinther sigur, at tey vóru komin so langt, at tey høvdu gjørt eina samhaldsfasta eftirlønarskipan.

– Málið varð lagt fyri aðalfund, sum tók fult undir við ætlanini. Men tá ið vit nú skulu fara til verka, kemur landsstýrið sum ketta upp úr høvdatrogi og við eini heilt aðrari loysn, har øll skulu tvingast til at betala í eina eftirlønarskipan.

– Tað gjørdi, at vit máttu leggja alt okkara arbeiði á hyllina. Men skipanin hjá landsstýrinum kom bara ongantíð. Avleiðingin er, at Føroya Arbeiðarafelag kom alt ov seint ígongd við sína eftirlønarskipan.Vóru vit farin í gongd beinanvegin, hevði okkara eftirlønargrunnur verið á einum munandi hægri støði í dag enn hann er.

Tað er eisini ringt hjá Ingeborg Vinther at svølgja, at politikarar skulu gera av, hvussu eftirlønarskipanin hjá Føroya Arbeiðarafelag skal vera.

### Mugu passa allar skógvar

Ingeborg Vinther hevur sjálv havt møguleikan at hava politiska ávirkan, tí hon sat sjálvt á tingi frá 1994 til 1998 sum umboð fyri Verkamannafylkingina.

Men tað hevði hon so ringar royndir av at hon stillaði ikki uppaftur í 1998.

– Tað vísti seg skjótt, at fyri at vera politikari er neyðugt at passa allar skógvar. Eg fór á ting við eini hugsjón, og tað var at arbeiða fyri tey ringast staddu í samfelagnum. Men tá ið eg ikki vildi víkja frá hesi hugsjón, varð eg fryst úti.

Ingeborg sigur, at Verkamannafylkingin varð stovnað, tí tey føldu, at tað var ongin arbeiðaraflokkur eftir á tingi.

Høvdu vit staðið saman, og arbeitt útfrá teimum hugsjónum, sum vit fóru til valið uppá, kundi tað blivið ein sterkur flokkur.

Men ístaðin syndraðist fylkingin.

Ingeborg Vinther sigur, at hon fekk í hvussu so er tað burturúr, at nú veit hon, hvussu politiska skipanin virkar og tað var ein góð læra, sum mangan hevur verið hent síðani. So tað var ikki heilt burturspilt kortini.

### Hevur framvegis nakað at bjóða

Ingeborg Vinther sigur, at tað skerst ikki burtur, at tað hevur gingið bæði upp og niður hesi 25 árini, hon hevur verið forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

– Í áttatiárunum var ov mikið av arbeiði til allar hendur. Í nítiárunum máttu vit heilt niður á botn at venda. Hesi kreppuárini hava verið tey svárastu í mínari tíð sum forkvinna. Bara frá 1992 til 1994 misti Føroya Arbeiðarafelag 2.200 limir, so hart rakti kreppan.

Men so slætnaði sjógvurin aftur, men nú eru aftur aðrar avbjóðingar, tí nú er aftur farið at síga saman-um.

– Størsta avbjóðingin nú er at útbúgva arbeiðsfólk. Arbeiðið í fiskivinnuni minkar alsamt, so tey, sum har eru, mugu sostatt fáa aðrar møguleikar.

Ingeborg Vinther heldur, at tað hevur gingið alt ov strilti hjá myndugleikunum at gera ein lógarkarm fyri eftirútbúgvingar og útbúgvingar til ófaklærd. Men hon heldur at verkafeløgini mugu eisini sjálvi royna at fáa avtalur við arbeiðsgevararnar um eftirútbúgvingar.

– Oljuvinnan verður eisini ein stór avbjóðing, tí har mugu vit eisini verða upp á vakt, og fáa greiði á, hvussu vit skipa okkum fakfelagsliga í eini møguligari oljuvinnu.

### Ikki útbrend enn

Hóast Ingeborg Vinther nú hevur verið forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í 25 ár, heldur hon, at hon er langt ífrá útbrend enn.

Hon stendur fyri vali á aðalfundinum hesuferð og hon ætlar at bjóða seg fram einaferð afturat.

– Hetta er eitt so fjølbroytt og spennandi arbeiði, at tað blívur ongantíð einstáttað og tað eru ongantíð stundir at keða seg.

– Tað er ongin dagur líka, tí tað eru nýggjar avbjóðingar hvønn dag og tí haldi eg, at eg framvegis havi nakað at geva felagnum.

– Viðhvørt kann eg føla meg troytta, men tað javnar seg skjótt. Men hetta hetta er krevjandi arbeiði og tað hevur eisini sín prís. Og størsti prísurin er, at eg má verða meiri burtur frá mínum nærmastu enn eg hevði viljað, tí tíverri koma tey viðhvørt í aðru røð.

### Løðir battaríið uttandura

Men hon brúkar eisini tíð uppá at løða battaríið.

– Eg fari altíð tíðliga upp. Eg føli, at dagurin er heilt oyðilagdur, tá ið eg ikki eru tíðliga uppi.

Hvønn morgun um sjey tíðina fari eg ein langan gongutúr og tað geri eg ofta eisini um kvøldið

– Annars gangi eg úti í bøi og haga hvørja løtu eg kann. Og urtagarðsarbeiði hevur eisini mín stóra áhuga, so alt í alt eri er rættiliga nógv uttandura í frískari luft.Yvirhøvur eri eg so nógv úti, sum tilber.

Men hennara heilt stóri áhugi er tann føroyski dansurin og hon er virkin í dansifeløguum í Suðuroynni.

Tá ið vit so at enda spyrja Ingeborg Vinther, hvørji ynski hon hevur fyri landi og fólki tey komandi árini, sveimar hon víða.

– Eg vildi ynskt, at tað eydnaðist okkum at skapa eitt rættvísari samfelag, har stættarmunurin verður meiri útjavnaður, so at tey veiku í samfelagnum fingu tað betri, og at hvør einasti føroyingur hevur tað rættartrygd, hann hevur krav uppá.

Og so kundi hon eisini hugsað sær eitt enn sterkari Føroya Arbeiðarafelag, so at tað verður enn betri ført fyri at sláa manngarð um limir sínar og at verja borg, tá ið ágangurin er harður.